# Íslendingar á veg inn í Restorff's

**Sum skilst eru í løtuni samráðingar millum Restorff's bryggjarí og íslendingar um samstarv, sum hevur við sær, at íslendingar keypa seg inn í føroyska bryggjaríið, og harvið umvegis bakdyrnar koma inn á føroyska marknaðin við føroyskum øli**

VINNULÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Herfyri kom fram, at Restorff's bryggjarí er í samráðingum við útlendska fyritøku, sum er áhuga í samstarvi við føroyska bryggjaríið. Hesar samráðingar tykjast nú verða komnar nokk so væl áleiðis, at ein endalig avtala væntandi kemur í lag fyri nýggjár.

### Fleiri hava áhuga

Johan Mortensen frá Restorff's bryggjarí vil ikki gera tær stóru viðmerkingarnar til samráðingarnar, men hann váttar tó, at tær eru komnar væl áleiðis, og hann væntar, at tað fellur upp á pláss ein av fyrstu døgunum.

- Eg fái ikki sagt so nógv í løtuni. Tað hevur verið áhugi frá fleiri síðum, og vit eru heilt nær eini endaligari avtalu. Meira fái eg ikki sagt, sigur Johan Mortensen.

Tað ljóðar, at talan er um íslendingar, sum sýna Restorff's áhuga. Í sambandi við fríhandilssáttmálan, sum føroyingar og íslendingar gjørdu fyrr í ár, er tað blivið lættari hjá bæði íslendingum og føroyingum at koma inn á marknaðin hjá hvørjum øðrum, og hetta hevur møguliga fingið okkurt íslendskt bryggjarí at venda eyguni móti føroyska marknaðinum.

Við at keypa seg inn í Restorff's bryggjarí ella bara við einum samstarvi við føroyska bryggjaríið kunnu íslendingar lættari koma á føroyska marknaðin, og vøran hjá teimum kann verða seld á øllum sølustøðunum hjá Restorff's.

Johan Mortensen hevur ikki hug til at gera viðmerkingar til hetta, men hann sigur tó, at tað sjálvsagt er ein møguleiki, at íslendingar eru á veg inn á føroyska ølmarknaðin.

- Íslendingar síggja jú Føroyar sum ein marknað við sløkum 50.000 nýggjum brúkarum, sigur Johan Mortensen.

### Góð jólasøla

Spurdur, hvussu tað gongur við jólasøluni, sigur Johan Mortensen, at tað gongur bara heilt væl.

- Vit hava selt heilt væl. Tað er serliga Trøllið, sum hevur gingið rættuliga væl, men Tarvurin hevur eisini eina vaksandi sølu. Fyri mær tykist tað, sum um fólk eru blivin eitt sindur meira kræsin, tá ið tað snýr seg um øl, og tí ikki bara keypa tað vanliga. Hetta síggja vit serliga millum yngra ættarliðið, sum hevur tikið serstakliga væl móti nýggju vørunum hjá okkum, sigur Johan Mortensen.




*Óla Svenn Nolsøe, stjóri á Restorff's bryggjarí, við tveimum av best umtókt vørunum hjá bryggjaríinum, Tarvinum og Trøllinum, sum hava selt heilt væl til jóla.*

*Mynd: Terji Nielsen*

---

## Jólabryggj og -brús streyma úr Klaksvík

Av Føroya Bjór í Klaksvík siga tey seg hava merkt eina munandi framgongd í jólasøluni, tá sammett verður við undanfarin ár.

- Eg fari ikki at nevna nøkur tøl. Men vøksturin liggur um eini 20% sammett við í fjør. Og tað er sjálvandi nakað, sum vit eru sera fegin um, sigur Einar Waag, stjóri.

Hann sigur, at talan hevur verið um javnan vøkstur um alt landið. Og eisini er nakað av jólabrygginum selt í Danmark, har felagið, Vestjysk Ølkultur, nú bjóðar seg fram sum útvegari av jólabryggi úr Klaksvík. Hetta er sama felag, sum fleiri ár á rað hevur atkvøtt Føroya Bjór inn sum vinnara, tá felagið hevur havt royndarsmakkingar av páska- og jólabryggi.

**-mørk**

# Jólasølan økt munandi

**Tað letur til, at føroyingar hava nógv fleiri pengar millum hendurnar í ár, enn teir høvdu í fjør, tí handlarnir boða frá eini nógv øktari jólasølu**

JÓLASØLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur sett seg í samband við fleiri handlar at vita, hvussu jólasølan í ár hevur eydnast, og allastaðnis verður boðað frá eini munandi øking.

### Fólk eru bjartskygd

Flestallir føroyingar vitja ivaleyst sølumiðstøðina SMS undan jólum, og stjórin í SMS, Niels Mortensen, er stak væl nøgdur við jólasøluna í ár.

- Tað er munandi vøkstur í jólasøluni í ár í mun til í fjør, og vit merkja týðuligani, at fólk eru meiri bjartskygd um árið, ið liggur fyri framman, enn tey vóru undan jólum í fjør. Eg havi tosað við handlarnar her í húsinum, og teir siga allir tað sama. Sølan er nógv økt, og tað tykist sum um, at fólk hava meiri pengar millum hendurnar, sigur Niels Mortensen.

Stjórin í SMS sigur eisini, at kappingin, sum nú endiliga er komin millum peningastovnarnar, eisini kemur okkum tilgóðar. Niels Mortensen sigur, at leiðslan í SMS, eins og viðskiftafólkini, sær nógv ljósari upp á árið, ið liggur fyri framman, enn teir gjørdu um sama mundi í fjør.

### Gingið ómetaliga væl

Eisini í Handilskjarnanum merkja tey ein stóran vøkstur í jólasøluni. Hans Waag, stjóri í Handilskjarnanum, sigur, at sølan hjá teimum í er munandi størri enn í fjør.

- Tað hevur gingið ómetaliga væl, og sølan er vaksin munandi. Vit komu inn í Handilskjarnan í november í fjør, so í veruleikan er jólasølan í ár tann fyrsta hjá okkum, tí í fjør var hon longu byrjað, tá ið vit komu til, sigur Hans Waag.

Stjórin í Handilskjarnanum sigur, at viðskiftafólkini byrjaðu rættuliga tíðliga í ár at keypa jólagávur, og tí hevði hann kanska væntað, at sølan nú beint undan jólum ikki var tann sama sum í fjør, men so er ikki.

- Tað vísir seg, at hóast fólk byrjaðu rættuliga tíðliga at keypa jólagávur í ár, so hevur sølan verið rættuliga støðug, sigur Hans Waag.



*Føroyski brúkarin tykist ikki verða sparin í ár. Handlarnir boða frá, at jólasølan í ár er munandi størri, enn hon var í fjør.*

*savnsmynd*